

# Greinari: Hetta er ein ónd ringrás sum rakar oljuvinnuna

**Jógvan Hugo Gardar**

04.10.2014 - 12:56

Oljan.fo

Ikki síðani mai í 2012 fall keypsskálin líka nógv sum hann gjørdi hósdagin.

- Íløguhýrurin er ikki uppá tað besta, og tað er ein sjálvfylgja at tá meir enn helminurin av keypsskálanum í Oslo eru partabrøv sum eru knýtt til oljuvinnuna og oljuprísurin lækkar sum hann ger, so er tað ein sjálvfylgja at man kann gerast eitt sindur sinnistungur. Hetta leggur enn meir trýst á oljufeløgini, og ger at fleiri ætlanir verða lagdar á ís, sigur oljugreinarin hjá Nordea, Thina M. Saltvedt, sambært Dagens Næringsliv.

Hon meinar at orsøkin til at oljuprísurin er lækkaður so nógv er at OPEC so knappliga økti um framleiðsluna. Sambært Saltvedt er tað ikki óvæntað at framleiðslan hjá OPEC fór at

økja, tí Saudi Arabia framleiddi munandi minni í august, og hevur sagt at tey kunnu liva við einum oljuprísi sum liggur um 100 dollarar fyri fatið.

-100 dollarar hevur leingið verið mett sum eitt ”gólv” í oljuprísinum, sigur hon.

Hon fær stuðul frá einum øðrum greinara, Alexander opstad, í DNB Markets.

- Vit tulka støðuna sum at OPEC ikki longur hevur 100-dollarar sum eitt mál, men at lond sum Saudi Arabia nú hava meir hug á sínum parti av marknaðinum, enn at halda prísinum uppi, sigur hann.